gult10 cyan10 magenta10 svart10



# Sølustevna á altjóða støði

**– Vit verða klár at lata messuna upp týsdagin, siga tey, sum skipa fyri størstu handilsstevnu í Føroyum nakrantíð. 100 útlendsk feløg verða umboðað, og roknað verður við 7000 vitjandi**

NAFF
*Eyðun Klakstein*

**Runavík:** Týsdagin í komandi viku verður fyrsta altjóða sølustevnan hildin í Føroyum, og talan er um óhoyrt stóra stevnu, tá hugsað verður um føroysk viðurskifti.

100 útlendsk feløg fara at sýna fram saman við líka nógvum føroyskum feløgum. Eini 700 útlendsk umboð koma til Føroya í sambandi við stevnuna, og samanlagt verður roknað við eini 7000 gestunum á fyrstu North Atlantic Fish Fair (NAFF), sum verður hildin í Runavík.

Um samanlíkningar skulu gerast við vanligu føroysku handilsstevnurnar, so svarar NAFF til fimm slíkar stevnur.

– Fyrireikingarnar hevur gingið væl, og vit eru klár at lata fyrstu altjóða messuna í Føroyum upp, sigur Símun Hammer, sum er projektleiðari. Hann er stjóri fyri felagnum, Virkisráðgeving, sum hevur staðið fyri fyrireikingunum av NAFF.



*– Fyrireikingarnar hevur gingið væl, og vit eru klár at lata fyrstu altjóða messuna í Føroyum upp, sigur Símun Hammer, sum er projektleiðari á NAFF*
*Mynd: Eyðun Klakstein*

### Gekk betri enn væntað

North Atlantic Fish Fair er ein stóra ætlan, sum vaks seg størri enn bæði stigtakararnir og fyriskipararnir høvdu roknað við.

– Undirtøkan fyri stevnuni hevur verið óvæntað stór. Vit miðjaðu eftir, at 40% av framsýnarunum skuldu verða útlendskir, men undirtøkan úr útlandinum hevur verið so stór, at helvtin av framsýnarunum eru útlendskir, sigur Símun Hammer.

– Vit arbeiddu frá byrjan við, at hetta skuldi fara at verða ein altjóða sølustevna, tí tað var tað, sum føroysku virkini og feløgini høvdu áhuga í. Tað má sigast, at tað hevur eydnast okkum at gera hetta til eina altjóða stevnu.

Framsýnararnir koma úr Norðurlondum, Skotlandi og Írlandi, men vitjandi á stevnuni verða eisini úr øðrum londum. Tað kostar fimm milliónir krónur at stíla fyri stevnuni, og samanlagt liggja trý ársverk í fyriskipanini.

### Brúka øll hotellplássini

Tað koma millum út ímóti 700 útlendskir gestir til landið í sambandi við stevnuna, og øll hugsandi gistingarpláss í meginøkinum verða brúkt til at hýsa hesum mongu fólkunum.

Gistingarhúsini í Havn og í Eysturoynni verða á tremur í komandi viku, og harafturat skal Norrøna eisini brúkast sum hotelskip í Runavík.

– Gistingarorkan er ein trupulleiki í sambandi við slíkar stevnur, men við at brúka Norrønu ber til at hýsa øllum fólkunum, sigur Símun Hammer, projektleiðari.

Fólkini, sum búgva í høvuðsstaðnum, fara at ferðast millum gistingarhúsið og stevnuna, sum verður hildin bæði á kaiøkinum í Runavík, í ítróttarhøllini og í bátahylinum.

– Vit hava roynt at hildið fyrireikingarnar á altjóða støði, og vit fáa til dømis telt úr Skotlandi og básar úr Danmark. Aðrar tænastur verða veittar av føroyskum fyritøkum. Tað er av avgerandi týdningi, at teir veitarar, sum vit hava valt, eru førir fyri at loysa uppgávuna væl og virðiliga, sigur Símun Hammer.

Týsdagin varð farið undir at seta teltini á kaiøkinum upp, og komandi týsdag skal alt verða liðugt, so fyrsta altjóða fiskivinnustevnan í Føroyum kann lata upp.

Stevnan verður í døgunum frá 15. til 17. mai, og opið er hvønn dag frá klokkan 10.00 til 17.00.

# Verkfall fer at órógva

**– Verður verkfall komandi vikuna, fer tað at merkjast á sølustevnuni, sigur Símun Hammer, projektleiðari fyri NAFF**

VERKFALL?
*Eyðun Klakstein*

**Runavík:** Fara arbeiðarafeløgini í verkfall komandi vikuna, fer tað at órógva fyrstu altjóða fiskivinnustevnunaí Føroyum.

– Tað verður ómetaliga keðiligt, um vit fáa verkfall, men stevnan kann gjøgnumførast fyri tað. Tó fer eitt verkfall at ganga út yvir støðið á stevnuni, sigur Símun Hammer, sum er projektleiðari fyri North Atlantic Fish Fair.

Hetta segði hann fyrrapartin í gjár, tá arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevarar framvegis royndu at semjast um nýggjan sáttmála. Tá okkara blað fór til prentingar var einki úrslit komið fram um samráðingarnar.

– Fara arbeiðarafeløgini í verkfall verður vasking á gistingarhúsunum rakt, og somuleiðis kann tað fáa avleiðingar fyri busskoyringina millum Havnina og Runavík.

Spurningurin er eisini, hvussu tað verður við stevnuvøru, sum kemur til landið mánadagin.

### Stríðast fyri stevnuni

North Atlantic Fish Fair er løgd ta ársins tíð, sum passar best til slíka stevnu.

– Vit royndu at taka øll viðurskifti við, tá vit ásettu dagarnar, og tað var nógv, sum talaði fyri, at stevnan skuldi leggjast, sum hon er løgd, sigur Símun Hammer.

Skuldi Norrøna brúkast sum hotelskip, skuldi tað antin verða áðrenn ella eftir summarsiglingina, og skuldi stevnan haldast í heyst, hevði hon komið í beinleiðis kapping við aðrar altjóða fiskivinnustevnur.

Møguligt verkfall varð eisini tikið við í myndina, men samanlagt var mai mánaði best egnaður.

– Tað verður sjálvandi ómetaliga keðiligt, um eitt verkfall kemur at órógva stevnuna, sum vit hava fyrireikað so leingi.

– Men vit mugu royna at halda stevnuna á so høgum støði sum gjørligt, og eg rokni eisini við, at framsýnarar og vitjandi fara at skilja støðuna, um eitt møguligt verkfall kemur, sigur Símun Hammer.

# Stríðast við skeinkiloyvi

**Í gjár fóru fyrireikararnir av North Atlantic Fish Fair á fund við løgmann og loyvisnevndina í eini roynd at fáa skeinkiloyvi til Norrønu, meðan hon verður brúkt sum hotelskip í Runavík**

SKEINKING
*Eyðun Klakstein*

**Runavík:** Fyrireikararnir av stóru altjóða fiskivinnumessuni í Runavík skuldu í gjár gera enn eina roynd at fáa skeinkiloyvi til Norrønu, meðan hon verður brúkt sum hotelskip í Runavík.

Norrøna hevur loyvi at skeinkja sterkt, tá siglt verður, men støðan er ein onnur, tá hon liggur við kai.

– Tað er ikki avgerandi fyri stevnuna, at Norrøna hevur skeikiloyvi, men hetta hevur nakað við altjóða støði at gera. Landsins myndugleikar vilja gjarna hava slíkar stevnur til Føroya, og so mugu karmarnir eisini verða í lagi, sigur Símun Hammer, projektleiðari av NAFF.

### Vín og øl hoyrir til

Á middegi í gjár fóru umboð fyri stevnuna og borgarstjórin í Runavík á fund við løgmann og formannin í Loyvisnevndini. Ætlanin var at sannføra myndugleikarnar um, at tað er skilagott at lata Norrønu fáa skeinkiloyvi.

– Norrøna kemur at verða rættiliga sentral á stevnuni. Hon verður hotelskip, og tí skuldi tað verið ein sjálvfylgja, at útlendskir gestir, framsýnarar og onnur kunnu fáa eitt glas av víni ella eina øl umborð, sigur Símun Hammer.

– Hetta skal ikki ljóða sum, at stevnan skal verða ein onnur veitsla, men hetta er partur av tí altjóða støði, sum vit vilja, at stevnan skal vera á, sigur hann.

Tá Sosialurin fór til prentingar var ikki greitt, hvat spurdist burtur úr royndini hjá fyrireikarunum at fáa skeinkiloyvi til Norrønu.

gult11 cyan11 magenta11 svart11




# Fiskiídnaðargransking

Leiðari av verkætlan innan fiskiídnaðargransking.

Verkætlaninar undir fiskivinnuroyndum skulu kannast og eftirmetast í 2001. Serliga skal metast um endamál, týdning, mannagongdir, eftirlit og almannagerð av úrslitunum. Út frá hesum skal eitt uppskot um setning og arbeiðslag framyvir gerast og setast í verk. Eisini skal viðgerast á hvørjum økjum fiskiídnaðargransking kann mennast og skipast í Føroyum. Út frá niðurstøðunum verða uppskot til fiskivinnuroyndirnar í 2002-2004 skipaðar og lagdir fyri Fiskimálastýrið.

Arbeiðið verður stýrt av einum leiðslubólki mannaðum við umboðum frá Fiskirannsóknarstovuni, Menningarstovuni, Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, Ráfiskakeyparafelagnum og Ráfiskaseljarafelagnum.

Til at standa fyri arbeiðinum verður søkt eftir fólki við skjalfestum førleika innan fiskiídnaðargransking (Phd ella meiri) og fyrisiting. Arbeiðsstað, løn og tíð verður eftir avtalu við rætta umsøkjaran.

Umsóknir, við avritum av viðkomandi próvskjølum, arbeiðsroyndum (CV) og eini lýsing av, hvussu arbeiðið kann skipast, skulu innan 15. juni sendast til Fiskirannsóknarstovuna Att: Hjalti í Jákupsstovu við frámerkinum »Fiskiídnaðargransking«.

Fiskirannsóknarstovan
Box 3051
FO 110 Tórshavn
Føroyar

Telf. +298 315092
Fax +298 318264
E-mail hjaltij@frs.fo

Á løgtings fíggjarlógini er játtan til Fiskivinnuroyndir. Fiskimálastýrið umsitur royndirnar, ið verða fyriskipaðar í samstarvi millum Fiskirannsóknarstovuna, Heilsufrøðiligu Starvsstovuna og Menningarstovuna. Játtanin er til fiskiroyndir og kanningar, herímillum vørumenning og hvussu mest fæst burturúr øðrum fiskasløgum.



# Føroya Landsbókasavn

**Á Føroya Landsbókasavni eru hesi størv leys at seta:**

**Hjálparfólk**
Eitt starv sum hjálparfólk. Fólk við royndum í bókasavnsarbeiði hava fyrimun. Starvið verður sett frá 15.6.2001 ella skjótast til ber.

**Bókabindaralærlingur**
Eitt lærupláss sum bókabindaralærlingur. Starvið verður sett frá 1.9.2001.

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Skrivligar umsóknir verða at senda Føroya Landsbókasavni í seinasta lagi 28.5.2001.

**Føroya Landsbókasavn**
J. S. Svabosgøta 16
Box 61 · FO-110 Tórshavn



# Skúlastýrisval Fuglafjarðar skúli

Vallistin til skúlastýrisvalið tann 28. mai 2001 liggur frammi á skrivstovuni í skúlanum til 21. mai.

Fólk, sum ikki eru komin á vallistan, og sum hava valrætt og valbæri, skulu venda sær til skúlan **í seinasta lagi 21. mai** við undirskrivaðari váttan fyri at koma á vallistan.

**Uppstillingarfundur** verður í fimleikahøll skúlans **mánakvøldið 14. mai kl. 19.00.**

Fuglafjørður, tann 7. mai 2001

**Valnevndin f. Fuglafjarðar skúla**



# Frá Hvalvíkar kommunu

Vallistin til skúlastýrið hongur uppi í talvuni í Streymnesi og Hvalvík og liggur frammi í kommunuskrivstovuni til fríggjadagin 18. mai.

Fólk, sum ikki eru á listanum og sum hava valrætt og valbæri, skulu venda sær til valnevndarformannin, Sjúrða Ferjá, í seinasta lagi 20. mai.

Uppstillingarfundur verður í skúlanum leygarkvøldið 12. mai kl. 21.00.



# Vit sóknast eftir fólki

at byrja skjótast gjørligt hjá Føroya Bjór í Havn.

Viðkomandi má hava koyrikort til lastbil.

Arbeiðið umfatar m.a. søluarbeiði og útkoyring av vøru.

Løn eftir avtalu.

Føroya Bjór
Avgreiðslan
Akranesgøta 10 • Tórshavn
Tlf. 313434 ella 214334



# Frá Valnevndini í Miðvágs-Sandavágs skúla

Vallistin til skúlastýrisvalið 28. mai liggur frammi á kommunuskrivstovunum í Miðvági og Sandavági.

Foreldur, sum ikki eru á vallistanum og ynskja at verða skrásett, kunnu venda sær til skúlastjóran innan 21. mai.

Uppstillingarfundur verður á Giljanesi mánadagin 14. mai kl. 19.

**Valnevndin**



**Til nýggjan handil í Klaksvík**
# søkja vit eftir Fólki

at byrja eftir nærri avtalu.

Persónslýsing:
- Er fyrikomandi
- Er kundavinarligur
- Er ágrýtin
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

Tað er ein fyrimunur, um tú hevur royndir innan handil, men er hetta eingin treyt.

Hevur hetta tín áhuga, so skriva til okkum skjótast tilber.

**KIOSK VÁR**
600 Saltangará
tlf. 448392 millum kl. 9-10



**Søkt verður eftir**
# Fólki

til handil okkara í Saltangará at byrja eftir nærri avtalu.

Persónslýsing:
- Er fyrikomandi
- Er kundavinarligur
- Er ágrýtin
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt

Tað er ein fyrimunur, um tú hevur royndir innan handil, men er hetta eingin treyt.

Hevur hetta tín áhuga, so skriva ella ring til okkum skjótast tilber.

**KIOSK VÁR**
600 Saltangará
tlf. 448392 millum kl. 9-10



# Fráboðan um broyting í busskoyring gjøgnum Skála bygd:

Koyrt verður ikki longur eftir gamla bygdavegnum millum Sparikassan og verkstaðin hjá HT-Transport.

STRANDFARASKIP LANDSINS **Bygdaleiðir**



# Elektrikari

Søkt verður eftir elektrikara. Áhugaðir kunnu venda sær til:

**EL og Automatik**
Heri Mortensen · FO-900 Vágur
Tlf. 374757/214757